## DAGSINS MEINING

# 1. mai – samhaldsfesti og visiónir

Í dag er fyrsti mai, altjóða dagur verkafólksins. Í stórthundrað ár hava verkafólk um allan heim savnast fyri at seta fram krøv og fyri at vísa samfelagnum, at millum verkfólk ræður samhaldsfesti, samanhald og stríðsvilji. Eisini verður dagurin nýttur til at seta fram krøv um betri løn, styttri arbeiðstíð og ymsar ábøtur á arbeiðsviðurskifti og arbeiðsumhvørvi. Fyri verkafólk kring allan heim hevur dagurin havt stóran symbolskan og politiskan týdning, og spurningurin er so, hvønn týdning hann hevur í dag. Er ikki samfelagið so nógv broytt, at dagurin er um at missa sín týdning, verður stundum spurt. Svarið er púra greitt: altjóða dagur verkafólksins hevur framvegis stóran týdning, og dagurin hevur als ikki minni týdning á okkara døgum, enn dagurin hevði fyri fimti ella fyri hundrað árum síðani. Víst er samfelagið nógv broytt. Vit eru í tí postídnaðarliga kunningarsamfelagnum, og stættamunirnir eru kanska ikki so sjónligir, sum fyri fimti ella fyri hundrað árum síðani. Vælferðarsamfelagið hevur tikið broddin av tí mest himmalrópandi órættvísinum í siðbundna kapitalistiska samfelagnum. Hugmyndin um javnaðarsamfelagið er sett í verk á mongum økjum í Føroyum eins og í øllum Norðurlondum., um vit t.d hugsa um skúla- og útbúgvingarmøguleikar, almanna- og heilsuverk og arbeiðsumhvørvi.

Men teir grundleggjandi mótsetningarnir millum tann, sum selur sína arbeiðsmegi og tann, sum keypir arbeiðsmegi, eru framvegis til staðar í samfelagnum. Hetta er galdandi, hóast hitt almenna er ein hin største arbeiðsgevarin Føroyum í og við at hitt almenna eigur største peningastovnin, størstu framleiðslufyritøkuna í fiskivinnuni á landi og eina hina størstu útgerðarfyritøkuna. Men hesir partar av vinnulívinum vera riknir gróthart eins og privatfyritøkur. Tað er tí neyðugt hjá verkamannafeløgunum at meta hesar fyritøkur sum privatar fyritøkur, hóast limir teirra sum føroyskir skattaborgarar eru medánarar av somu fyritøkum.

Føroyska verkamannarørslan og føroyski løntakarin hava gjøgnum árini vunnið nógvar sigrar, men enn er langt á mál. Verkamannarørslan hevur tó ment seg heilt nógv seinastu árini. Feløgini hava greið mál og nýggjar visiónir eitt nú á eftirlønarøkinum. Dugnalig og hugdjørv fólk standa á odda fyri feløgunum og fyri fyrstu ferð eru øll feløgini á privata arbeiðsmarknaðinum saman um samráðingarnar. Hetta er sera spennandi og skuldi alt annað líka økt um møguleikarnar fyri einum góðum úrsliti. Hvat feløgini ítøkiliga krevja á ymsu økjunum er ikki heilt greitt, tí almenningurin er ikki sloppin at hyggja í kortini enn. Men ein kann gita, at umframt hægri tímaløn eru helst eisini eftirlønarviðurskifti og eftirútbúgvingarspurningar á samráðingarskránni.

Vit ynskja verkamannafeløgunum góða eydnu við samráðingunum, og vóna at tey við samhaldsfesti, visiónum og miðvísum samráðingarhegni koma fram til eitt úrslit, ið gagnar landi og fólki. Báðir partar á arbeiðsmarknaðinum mugu tó vera tilvitaðir um sína samfelagsligu ábyrgd. Øðrumegin er gott kappingarføri ein fortreyt fyri framhaldandi menning. Hinumegin er tryggleiki og góð arbeiðsviðurskifti sum heild ein av hornasteinunum í einum vælvirkandi vælferðarsamfelag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til Marjus Dam

**Jógvan Jespersen**
*útvarpsstjóri*



Í Dimmalætting í gjár setir Marjus Dam, løgtingsmaður, mær nakrar spurningar, tí hann heldur, at Sambandsflokkurin varð settur uttanfyri kjakið, sum var í ÚF í síðstu viku um blokkstuðulin.

Tað haldi eg ikki, at Sambandsflokkurin var.

Upprunin til hetta kjak vóru orðini hjá Hermanni Oskarsson, formanni í Búskaparráðnum, um at Føroyar eiga at sleppa sær av við blokkstuðulin her og nú. Annars er vandi fyri, at blokkstuðulin fer at verða brúktur sum stuðul. Endamálið hansara var uttan iva at fáa eitt politiskt orðaskifti um blokkstuðulin.

ÚF tók málið upp í síðstu viku. Fyrst í sendingini "Føroyar í dag", har orðaskifti var millum umboð fyri Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin um sjónarmiðini hjá formanninum í Búskaparráðnum, um at sleppa okkum av við blokkin.

Sambandsflokkurin hevur eina greiða støðu til blokkstuðulin, og er politiski polurin til Tjóðveldisflokkin í hesum máli. Hesin vinkulin varð so brúktur í kjaksendingini "Sostatt" mikudagin, har formaðurin í Tjóðveldisflokkinum og formaðurin í Sambandsflokkinum skiftu orð um evnið í framhaldi av sendingini týsdag.

Í hesi sendingini varð eisini lagt upp til, at vit skuldu hoyra sjónarmiðini hjá teimum báðum smærru flokkunum. Viðmerkingin frá formanninum í Miðflokkinum kom við í sendingini, men tíðin gekk undan, og tí kom viðmerkingin hjá formanninum í Sjálvstýrisflokkinum ikki við fyrr enn í tíðindasendingini dagin eftir. Hetta er tað, sum kann henda í eini beinleiðis sending.

Satt at siga haldi eg at tað er á markinum, at ein løgtingsmaður alment skuldsetir ÚF fyri at undirgrava demokratiið, eftir at hansara floksformaður í eini beinleiðis sending upp á 65 minuttir hevur havt møguleika fyri at siga alt tað, sum hon hevur upp á hjarta viðvíkjandi blokkstuðlinum.

Útvarpið hevur skyldu lógásetta skyldu til í sínum programmvirksemi at skipa fyri sakligari og óheftari upplýsing. Tað merkir kortini ikki, at øll áhugamál og øll sjónarmið skulu verða umboðað í hvørjari einstaka sending, tí tíðindaflutningur og upplýsingarvirksemi er ein prosess, sum í útvarpi gongur tíma fyri tíma, og dag fyri dag.

Yvir ávíst tíðarskeið skulu hesar treytir verða loknar, og tað haldi eg tær vóru í viðgerðini av sjónarmiðunum hjá formanninum í Búskaparráðnum um blokkstuðulin. Allir flokkar høvdu høvi til at greiða frá síni støðu til hetta mál.

# Ikki nøktandi – enn

**Schandorff Vang**
*Oyrarbakki*



Sameiningarnevndin fyri kommunarnar í Sundalagnum villeiðir fólkið!

Á fyrra fundinum blivu lagdar fram ætlanir um tær mest ótrúligu luftkastellir og á hesum fundinum bleiv ikki eitt orð nevnt um hetta. Jú – enn ein luftkastel – Hvalvík skal bjóða havnina fram til stór ferðamannaskip og so skulu Saksun, Tjørnuvík og Gjógv byggjast út til ferðavinnu sum alternativ inntøka.

Álvaratos – hvar er tann fyri nøkrum árum síðan spáddi ferðamannavøksturin?

Alt gott um ferðavinnu, men hon er einki alternativ at byggja hvørki kommunu- ella landsfígging við!

Heðin Zachariasen segði, at tað bar illa til at svara uppá spurningin hvørjir vansar eru í eini sameining. Er tað ikki alt ov bíligt at sleppa sær so lætt undan?

Eisini segði hann í viðmerkingunum um skattaprosentið, at teir "vildu hava tað at vera opið og erligt".

Hvat er opið og erligt? Tit hava als ikki verið opnir og latið okkum fáa innlit í neyðuga tilfarið um sameining.

Jógvan Mørkøre úr Hósvík segði, at borgarin kundi bara møta betri upp til bygdaráðsfundirnar, so fingu tey kunning. Rætt er tað, men eg havi fingið at vita, at umboðini fyri Sunda kommunu hava ikki kunnað bygdaráðið um alt, sum er fara fram í sameiningarnevndini. Hvussu skal man so fáa nakað at vita?

Á fyrra fundinum bleiv sagt, at ein faldari var gjørdur yvir fyrimunir, vansar og annað gott, men spurdir eftir faldaranum á fundinum, kundi eingin í panelinum vísa nakran faldara fram – faldarin var stutt sagt ikki gjørdur.

Árni Dam var hann, sum legði fram á fyrra fundinum og tosaði nógv um henda faldara, men mátti hann ryggsvimja og viðganga, at faldarin ikki var gjørdur, men harafturímóti vóru tað bert nakrar yvirskriftir, sum vóru festar á pappír.

Kann ein sameingin byggja bert á yvirskriftir?

Og pallborðið – hví var eingin nei-sigari við pallborðið?

Eg veit, at allir bygdaráðslimir als ikki eru samdir um sameiningina. Hví var onkur teirra ikki tikin við til pallborðið?

Hví tosaði eingin um tænastugjøld, sum vit kunnu væntað okkum fyri allar tær nógvu betri tænasturnar, sum sameiningarnevndin lovar?

Nógv er eftir enn at kunn aokkum um, og sum tað stendur í Fyrisitingarlógini, so skulu allir partar í málinum kunnast nóg væl. Vit eru mong, sum ikki hava fingið nøktandi kunning.

Tí atkvøði eg nei – men tað skal ikki forða fyri betri samarbeiði!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Stríðslúðrar

**1. mai 2003**

Stríðslúðrar aftur gella
fylkingin alment á ferð
stríðsblóðið sterka man vella
droyrreyða merkið á odda ber

stríðshugurin í besta blóma
við solidariska brandi á leið
javnrættarbirtuna hóma
eldhugaði frælslynti skarin steig

stríðsandan blása í unglingan fríða
øsandi kreftir í æðrunum strítt
mót kúgandi yvirstættini stríða
sjá frælsisljósið bleiktrandi frítt

ríkmanna svikabrøgd-blóðdálkaðu hendur
trælaok nívandi á okkum leggja
kapitalistisku skortar, hvar ein sær vendir
til rættvísisstríðið okkum vil eggja

kúgaða stættin gullið spinnur
ta kúgandi stættina føða
men socialisman tann sterka vil vinna
javnrættaraldan um alheimin fløða!

fámennisveldi undan vil flýggja
socialismunnar stríðsmerki væna
ríkmannafjøldin falla til kníggja
arbeiðarafjøldini brátt megu tæna!

høgrarákið durafjórðingin fáa
arbeiðarastættsins hægsta trá
brátt rættvísismálið droyrreyða náa
stríðsmikli 1. mai-sigur vil fá!

1. mai okkara blóðreyði stríðsdagur
í eystri so máttmikil roðar
kollvelting reyða í eygsjón-socialismunnar staður
javnrætt og frælsi socialisman oss boðar.

solidariska flóðaldan máttmikil er
alheims samhuga sýnir
socialistiska hugsjónin á sigursferð
eitrandi kúgandi liðið nú dvínur

stríðseyðkennisbúnar at sjá
kravgongur, verkføll reyða skaran skoða
javnrætt og frælsi viljum vær fá!
Stríðsljómurin vil okkum boða!

**Sólmundur Joensen**
1. mai 2003



# Oljuframsýning á Tvøroyri

TÍÐINDASKRIV

Ferðaframsýningin Oljuleiting við Føroyar vitjar á Tvøroyri.

Framsýningin læt upp mikudagin 30. apríl í fyrrverandi Statoilstøðini á Drelnesi. Hon lýsir partar av tí nýggjasta, sum vit vita um oljuna við Føroyar og greiðir frá, hvussu leitað verður eftir olju.

Á heysti 1992 fann bretska oljufelagið BP á fyrsta sinni olju í rakstrarverdum nøgdum á økinum millum Hetland og Føroyar. Fáar vikur frammanundan samdust Føroya landsstýri og danska stjórnin um, at landsstýrið skuldi yvirtaka málsøkið "ráevni í undirgrundini". Hesar hendingar settu av álvara gongd á fyrireikingarnar til oljuleiting á føroyskum øki.

Í øll hesi 10 árini, sum farin eru, hevur nógv verið at hoyrt um oljuleitingina við Føroyar. Ferðaframsýningin lýsir partar av tí virksemi, sum ein oljuleiting førir við sær.

Í framsýningini verður nomið við hesi evni:

- hvussu verður olja til í undirgrundini?
- hvussu sær eitt grótslag út, sum hevur olju í sær?
- hvussu er arbeiðsdagurin á einum boripalli?
- hvussu nógv kostar ein oljuboring á djúpum sjógvi?
- hvussu ansa vit eftir náttúruumhvørvinum undir eini oljuleiting?
- hvussu hevur søguliga gongdin kring oljunýtslu í heiminum verið? og mangt annað.

Framsýningin Oljuleiting við Føroyar byrjaði á Náttúrugripasavninum í Havn í juni 2002, og nú endar sýningin við vitjanum í Húsavík, í Klaksvík og nú á Tvøroyri. Ferðaframsýningin sum læt upp í gjár á Tvøroyri, verður opin dagliga til 19. maj. Opið er gerandisdagar frá kl. 10 til 12 og 13 til 16. Leygardag og sunnudag er afturlatið. Skúlaflokkar og aðrirbólkar kunnu avtala vitjanartíð á tlf. 37 24 80. Atgongdin er ókeypis.

# Tolin trívst

**Nicolina Justinussen**

Las nú um dagarnar eina grein í einum av bløðunum um ferðsluna hjá okkum, tá Strandfaraskipini koma, og hvussu longi tað er at bíða, inntil tú sleppur yvir um Leirvíksfjørð. Og tú skalt vera grúuliga heppin, um tú sleppur, tá tú ætlaði tær. Men eina lítla viðmerking havi eg til tað. Tað bleiv sagt, at mannskapi onki hevði við tað at gera. Men tað er nú ikki heilt beint, ella er tað broytt, tí eg kann minnast fyri árum síðani – tó ikki so grúuliga langt síðani.

Vit stóðu í røð og bíðaðu. Tá kom ein bilur, sum ein skjúttil og skuldi koyra umborð, men tá kom ein av okkara góðu, gomlu skiparum og segði við viðkomandi, at hann ikki átti tá. So tá var meira skil í, ella varð tað betur ansað eftir. Og hetta hendi aftur, fyri ikki so langari tíð síðani. Ja, tað var vist beint fyri páskir. Tá kom ein upp á sama máta, men hann slapp vist við. Ongin segði nakað við hann, men soleiðis er helst bara, men ljótt sá tað út. Tað er nú altíð ljótt at vera ljótur.

Nei, enn verður ein løta hjá okkum her norðuri at bíða, til vit kunna koyra í undirsjóvartunli. Tá verður ongin bíðitíð og lættari og betur, nú ferðslan er vorðin so nógv og fólk ferðast meira og bilarøðirnar bara økjast.

Vit ynskja og vóna, at tað verður øðrvísi, og eg hugsi, at øll hugsa tað sama.

*Framhald av síðu 33*

ferðavinnuna í álvara, tí alt ov leingi hevur vinnan verið merkt av pionerarbeiði, har fólk hava nýtt hugflog og megi til at yvirliva við øðrum hjávinnum.

Hugskotið við felags átakið fyri ferðavinnu í einum øki er kent úr Eysturoynni og hevur tað eydnast væl.

*Yvirlit yvir bygnaðin í nýggja felagnum: Ferðavinnan í Suðuroy. Tølini eru bert vegleiðandi*




### Yvirlýsing um ferðasambandið

Tá stovnanin av felagnum var avgreidd, var komið til ymiskt á fundarskránni. Og ymiskt varð havt á lofti. Viðtøkur felagsins siga, at arbeiðast skal fyri at betra ferðasambandið, men sannroynd er, at tað gongur øvugta vegin, var semja um á fundinum. Tyrluflúgvingin er burtur tann 1. mai og tað er ikki líka heppi at ferðast ørindi til miðstaðarøkið, sum tað hevur verið. Fundurin var samdur um, at tað er alneyðugt at ferðast til miðstaðarøkið, t.d. til lækna, og túrarnir, har ein sleppur suður aftur í hampuligari tíð, eru skerdir. Sleppast má undan, at ein skal frá húsum klokkan 6 ella 7 á morgni, fyri síðani at vera heima aftur á kvøldið klokkan 22 ella 23, var niðurstøða á fundinum.

Fundurin undraðist á, at einki hevur verið at hoyra til tingmenn, nú tyrluflúgvingin er tikin frá suðuroyingum.

Fundurin, sum umboðaði allar kommunur í Suðuroynni og ferðavinnuáhugað, samdist um at orða yvirlýsing, har kravt verður, at tyrluflúgvingin verður tikin upaftur og at túrarnir, har tað slepst suður í hampuligari tíð á degi, koma aftur á nøktandi støði.

Jógvan Krosslá gjørdi greitt, at suðuroyingar fara at krevja 3 túrar sjóvegis dagliga og at hetta krav úr Suðuroynni standa kommunurnar saman um.